Men Jesus talar eisini til okkum: „Tit skulu fáa kraft“. Tí kraft er tað okkum tørvar.

Heilt frá byrjan myndaði Gud menniskja í Síni mynd, so tey skulu fylla jørðina, og tey vóru skapt sum Gud (les Sálma 8). Líka inntil tey gjørdu seg til eitt við orð satans, vóru tey 100% fullkomin. Tá Gud kom í urtagarðin og rópti „Hvar ert tú?“, var tað ikki tí Gud spældi krógva og blunda. Hann visti hvar Ádam var, men Hann fann ikki tann fullkomna Ádam, sum Hann hevði myndað og skapt. Menniskjað, sum skuldi fylla jørðina við Guds dýrd, var ikki meir. Tessvegna mátti Gud senda okkum ein nýggjan Ádam – Jesus – sum livdi fullkomið sum menniskja. Og tá Hann nærkaðist endanum at fullføra eitt fullkomið jarðarlív, áminti Hann Sínar lærisveinar, at teir skuldu fáa somu Heilaga Andans kraft, sum Hann hevði livað í og praktiserað. Og mann má siga, at kraftin var ómetalig, hóast forfylgingin eisini var ómetaliga stór. Men kraftarinnar boðskapurin náddi allan heimin, og eisini her í Føroyum hava vit fingið lut í Kristusi. Men tað er samstundis undrunarvert, hvussu skjótt vit glíða inn í formar og mynstur, og hava fokus á at verða røtt samkomuumboð og at passa inn. Eg haldi, at framvegis er boðskapurin um kraft háaktuellur. Eitt er kraftin til frelsu, sum hevur endurføðing við sær, men tit skulu fáa kraft, táið Heilagi Andin kemur yvir tykkum, broytir okkara lív, so vit eru før fyri at broyta heimin. Og fyri at venda aftur til byrjanina, so er frelsan og kraftin givin okkum gjøgnum fullgjørda verkið á Golgata, og við Jesu uppreisn og við úthelling Heilaga Andans, so vit verða endurfødd til tann Ádam, sum hvarv í urtagarðinum Eden. Við endurføðingini eru vit fødd 100% fullkomin, tí Jesus er tað fullkomna sáið, og Heilagi Andin er okkara nýggja menniskja, sum meir og meir má taka yvir okkara hugsanir, ætlanir og gerðir. Vit kunnu ikki taka okkum saman, men yvirgeva okkum og játta tað nýggja lívið í okkum. Og síðani má Heilagi Andin livandigera okkara fatan av hvørji vit eru: útvald ætt, kongligur prestaskapur, heiløg tjóð, ognarfólk (1. Pæt. 2.9). Ístaðinfyri at gera okkum til eitt við meiningar um alt millum himmal og jørð, so mugu vit gera okkum til eitt við ætlan Faðirs okkara – at fylla jørðina við Guds dýrd. Og lyftið stendur fast: Tit skulu fáa kraft.

Eg ynski øllum eina kraftarfulla og dýrdarríka hvítusunnu.

*tj*

**STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA**

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*

# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*

## *Men tit skulu fáa kraft, táið Heilagi Andin kemur yvir tykkum* Áp. 1.8

Hesi orðini kenna vit væl úr ápostlasøguni, og eru kanska favorittørindi hjá „pinsum“. Men samanhangurin er ógvuliga áhugaverdur, tí Jesus svarar teimum aftur upp á spurningin: Er hetta tíðin, táið Tú endurreisir Ísrael ríkið? Og vit síggja tað ígjøgnum evangeliini og vit síggja tað eisini í dag; menniskja er so upptikið av religión, men eru minni upptikin av tí centrala. Teir hugsaðu fysiskt ríki, meðan Jesus hugsaði og talaði kraft. Og hetta er eisini í dag. Fólk eru upptikin av Jesu afturkomu, Ísraelsríki, endatíð o.s.fr.



# MAI 2023

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin<br>Lovsongsleiðari: |
| Leygardagur | 6. | | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 7. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.45 | **Morgunmøti við breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Nora, David og Kári<br>Ábyrgd/Leiðari: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur III<br>Uppvørpa: Aron<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Regin<br>Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 8. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Hans<br>Lovsongsleiðari: |
| Leygardagur | 13. | | **Reingerð:** Áshild og co. |
| Sunnudagur | 14. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.45 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg<br>Ábyrgd/Leiðari: Samuel<br>Lovsongsleiðari: Tummas, bólkur I<br>Uppvørpa: Eyðfríð<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Mariann<br>Kaffivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| Mánadagur | 15. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna<br>Lovsongsleiðari: |
| Leygardagur | 20. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 21. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.45 | **Morgunmøti við breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Pauli og Jastrid Høj<br>Kaffivertar: Anton Petur, Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 22. | Kl. 19.00 | **Felagsbøn í Oasuni** |
| Fríggjadagur | 26. | Kl. 20.00 | **Veitslumøti**<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., Øll<br>Talari: Merrick |
| Leygardagur | 27. | <br>Kl. 19.00 | Reingerð: Morid og co.<br>**Veitslumøti**<br>Ábyrgd/Leiðari: Atli<br>Lovsongsleiðari: Nomi, Øll<br>Talari: Merrick |
| Hvítusunnud. | 28. | Kl. 11.00 | **Veitslumøti**<br>Møtivertar: Øll<br>Lovsongsleiðari: Nomi, Øll<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Merrick<br>Kaffivertar: Øll |
| | | Kl. 18.00 | **Veitslumøti**<br>Lovsongsleiðari: Ingun, Øll<br>Talari: Merrick |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## *Hvítusunnustevnan 2023*



Aftur í ár fara vit at hava hvítusunnustevnu, sum verður í Filadelfia saman við Húsið Vón. Vit hava áður bjóðað Teresu og Andy Merrick at vera gestarøðarar, men vegna corona bar tað ikki til. Men í ár koma tey bæði, og tey koma bæði at undirvísa. Vit gleða okkum til eina vælsignaða og góða stevnu við góðum felagsskapi. Møtini verða fríggjakvøld kl. 20.00, leygarkvøld kl. 19.00, sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.